# NORÐURBRYGGJAN

– eitt felags vindeyga til umheimin



# Ein norðuratlantsdepil í hjartanum av Keypmannahavn

Norðurbryggjan er pakkhús bygt í 1767 og hevur gjøgnum tíðina verið nýtt í samband við handilin við londini í útnorðri – Føroyar, Ísland og Grønland. Tað var t.d. her skip til og úr Føroyum løgdu at við farmi og ferðafólki heilt upp til fyrst í seinastu øld.

Samlaða fermetratalið í Norðurbryggjuni er um 6700 og skal hýsa m.a. sendistovunum. Umframt verða stór felagsøki, ið verða brúkt til mentanartiltøk, fundir og framsýningar. Í húsinum er stór matstova, veitsluhøli og móttøka við kunningarvirksemi.

Norðurbryggjan liggur ógvuliga sentralt plaserað á Christianshavn út til Keypmannahavnar bryggju, har nýggju havnabussarnir fara at leggja at. Umframt eru tað bara 10 min. til metro og bussamband. Grannalagið fevnir um nýggju operu Keypmannahavnar og hinumegin bryggjuna er Nyhavn og nýggja kongaliga sjónleikarahúsið.

Norðurbryggjan fer at vera eitt vørutekin fyri londini í útnorðri. Eitt stað, har nógv fólk fara at koma í ørindum, at fregnast og til at njóta økið.
Tey, ið leiga og halda til her verða partar av einum umhvørvi, ið gevur trivna, og sum óivað verður til gagn fyri londini.





*Norðurbryggjan verður karmurin um sølustevnur og vinnufremjandi tiltøk.*

# Føroyar ráða yvir 4. hædd

Føroyar ráða yvir 4. hædd, sum er tilsamans um 1000 fermetrar. Umframt sendistovu Føroya fer Ferðaráðið at húsast her. Nakað verður leigað út til millumlanda samstarvsstovnar sum Northern Periphery Programme og Arctic Council Indigenous Peoples' Secretariat.

**1000 m²**
**Felags móttøka**
**Fundarhølir**
**Skrivstovur**
**Uppihaldsrúm**
**Starvsfólkarúm**
**Kopieringsrúm**




*Skrivstova 1: 406*
*Skrivstova 2: 407*
*Skrivstova 3: 411 (2 fólk)*
*Skrivstova 4: 415*
*Skrivstova 5: 416*

*Fundahøli 1: 401 (16 fólk)*
*Fundahøli 2: 441 (24 fólk)*

*Móttøka: 417/418*
*Kopieringsrúm: 408/414*
*Uppihaldsrúm: 403/443*
*Starvfólkarúm: 438*

# Eitt livandi umhvørvi

Ætlanin hevur alla tíðina verið, at føroysk virkir og stovnar skulu hava møguleika at gerast partur av umhvørvinum. Til tess at flest møgulig skulu hava hesa atgongd og fyri at tryggja eitt livandi umhvørvi, er gjørd "haldaraskipan".

Haldaraskipanin er soleiðis sett saman, at tú fært fría atgongd til skrivstovur og fundarhølir, sum eru útgjørd við øllum nútímans hentleikum. Tú kanst eftir tørvi nýta starvsfólkamatarstovuna í húsinum.

Móttøkan hjá sendistovuni tekur sær av øllum vanligum umsitingarligum uppgávum, sum telefonavgreiðslu, fundarfyrireiking og øðrum tænastum. Aftur at hesum kanst tú nýta ávísar tænastur, sum kopieringmaskinu og porto.

Tá ið tú skipar fyri serligum tiltøkum t.d. stórum fundum, kann móttøkan syrgja fyri, at matur o.l. verður bílagt, umframt at borðreiða og rudda. Haldaraskipanin er ógvuliga lagalig. Húsið hevur kortlyklaskipan, og tú fært við hesum møguleika at koma og fara soleiðis, sum tað passar.

**VINDEYGA**
**Umframt at Føroyar fáa høvi at sýna seg fram í vindeyganum saman við Íslandi, Grønlandi og Danmark, verður Norðurbryggjan eisini kjarna í samstarvinum millum londini um mentan, gransking og vinnu**
























SENDISTOVA FØROYA

STRANDGADE 91, 4 SAL
DK 1401 KØBENHAVN K
TLF. +45 32833770
FAX +45 32833775

www.bryggen.dk